# SAMSTARVSAVTALA

MILLUM

FØROYA LANDFÚTA

OG

VÁGA KOMMUNU

um upptøku av leysum hundum

og

um upptøku av øðrum dýrum
í Vága kommunu.

Við heimild í løgtingslóg nr. 82 um hundar frá 19. juni 1993 § 3, stk. 2, og lóg nr. 171 frá 18. mei 1937 for Færøerne om hegn- og markfred, umframt rættargangslógini, er gjørd henda samstarvsavtala um upptøku av leysum hundum og øðrum dýrum, umframt annað arbeiði.

**HUNDAR**

Fráboðan um, at hundur gongur leysur á økjum: götu, vegi, breyt ella øki sum er opin fyri vanligari ferðslu, verður givin til politistøðina. Politistøðin gevur boðini víðari til aktingarmannin sum Vága kommuna hevur sett. Aktingarmaðurin tekur hundin upp og boðar politistøðini nærri frá upptøkuni á serligum skjali.

Er upptøkan eftir metan aktingarmansins ov stór ella er ov torfør fyri hann einsamallan, hevur politiið skyldu at veita honum hjálp.

Hevur hundur fyrisett helsi ella spjaldur, boðsendir politiið ánaranum. Hevur hann ikki innan tríggjar ferðir 24 tímar frá tí, boðað er frá, loyst hundin móti at rinda tey gjøld, sum staðist hava av upptøkuni, verður hundurin avlívaður.

Hevur hundurin ikki fyrisett helsi ella spjaldur, lýsir politiið eftir ánaranum í bygdatalvuni. Hevur ánarin ikki innan tríggjar ferðir 24 tímar frá tí, boðað er frá ella lýst er í bygdatalvuni, loyst hundin móti at rinda tey gjøld, sum staðist hava av upptøkuni, kann politiið avhenda ella avlíva hundin.

## ONNUR DÝR

Seyður, ross, gæs, dunnur, høsn, kaninir og onnur dýr, sum politiið skal taka sær av sambært § 36 í lov om hegn og markfred og sambært rættargangslógini, verða tikin ímóti eftir áheitan frá politinum.

## VARÐVEITSLUSTAÐUR

Vága kommuna hevur útvegað eitt høli, ið er hóskandi til upptikin dýr.

Seyður og stórdýr, sum t.d. ross, kunnu vera havd uttandura.

## GJØLD

**Hundar:**

Fast gjald........................................................................................ kr. 300,00
Vistingargjald fyri hvørt nýkomið samdøgur í varveitslu.............................. kr. 125,00

**Kettur, kaninir, gæs, dunnur, høsn og onnur smádýr:**

Fast gjald........................................................................................ kr. 125,00
Vistingargjald fyri hvørt nýkomið samdøgur í varveitslu.............................. kr. 35,00

**Seyður:**

Fast gjald........................................................................................ kr. 125,00
Vistingargjald fyri hvørt nýkomið samdøgur tey fyrstu 6 samdøgrini
seyðurin er í varveitslu, pr. samdøgur.............................................. kr. 60,00
Vistargjald fyri hvør nýkomið samdøgur, síðan (pr. samdøgur)....................... kr. 35,00

**Ross og onnur stórdýr:**

Fast gjald........................................................................................ kr. 600,00
Fóður fyri hvørt nýkomið samdøgur, dýrið í varveitslu (uttandura)................. kr. 125,00

Aktingarmaðurin og politiið taka støðu til gjaldið, um ivamál eru, t.d. viðvíkjandi tali/aldri av dýri ella varðveitslutíð.

## LOYSING/AVROKNING

Áðrenn dýr ella hundur verður útflýggjaður ánara, skal politiið krevja ánaran eftir kostnað fyri upptøkuna.

Útflýggjan av hundum og dýrum fer fram eftir nærri avtalu millum politiið og aktingarmannin tó bert gerandisdagar millum kl. 0900 og kl. 1500.

Tó verður seyður og stórdýr bert útflýggjað beinleiðis frá varðveitslustaðum um so er, at tað eftir metan aktingarmansins er ov trupult ella ov kostnaðarmikið viðvíkjandi flutningi.

Skal dýr útflýggjast annað tíðarskeið enn tilskilað omanfyri, rindar ánarin eyka fyri ómakin.

Um dýrið ikki verður heintað, tá avtala er, hevur aktingarmaðurin ikki skyldu at útflýggja dýrið og ánarin hevur tí skyldu at gjalda meirkostnaðin og gera nýggja avtalu um útflýggjan við politiið.

Aktingarmaðurin fær boð um, hvørji dýr eru útloyst og flytur hesi til avtalaða útflýggingarstaðið.

Politiið skal avrokna eina ferð um mánaðan við Vága kommunu.

## AVLÍVING/AVHENDING

Hevur ánarin ikki loyst dýrið móti at rinda kostnaðin, avhendar ella avlívar politiið dýrið.

Politiið stendur fyri avlívingini. Politinum stendur frítt fyri at gera avtalu við aktingarmannin um medvirkan.

## ANNAÐ

Politiið hevur yvirlit yvir upptikin dýr.

Boð til ella frá aktingarmanni verða givin beinleiðis til politistøðina í Miðvági.

Aktingarskipanin virkar alt samdøgrið.

Tá ið politiið biður aktingarmannin um hjálp til arbeiði, sum tað áliggur politinum sum so at gera, sum t.d. í lóg nr. 171 frá 18. mei 1937 for Færøerne om hegn og markfred § 36: "Er husdyr indsat og dets ejer ikke kendes, kan det overleveres til politiet, som har at tage sig af det", verður arbeiðið gjørt eftir rokning, og á sama hátt, um politiið annars biður um, at aktingarmaðurin ger ávíst arbeiði, eitt nú í samband við avlíving ella óhapp.

Samstarvsavtalan fær gildi tann 1. februar 2010.

Sandavágur, tann 13/1- 2010

Albert Ellefsen

Vága kommuna

Tórshavn, tann 13 JAN. 2010

Finn Ougaard

vicepolitimester

Føroya Landfúti